


## Søkt verður eftir

einum fólki til handil okkara í Havn fulla tíð.

Arbeiðið verður fjølbroytt og kemur at fevna um kundarøkt, prísáseting, dekorera og annað.

Vit seta eingi ávís førleikakrøv. Tó hava umsøkjarar við royndum innan handil og dekorering fyrimun.

Vit leggja dent á, at tú ert álítandi, hevur arbeiðsevni og dámar væl at umgangast nógv fólk.

Vinarliga sendið skrivliga umsókn til:

Thomas Dam búnýti

Niels Finsensgøta 18 · Box 1094 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 314930 · Fax 314933

---

TK Stovan

**Tiltøk fyri vinnuna**

Vitja www.tk.fo, har yvirlit er yvir tiltøk í Føroyum ætlað vinnuni, t.d. kunningarfundir, skeið, framsýningar v.m.

Til ber øllum at leggja tiltøk ókeypis inn á síðuna, og eisini at melda seg til einstøku tiltøkini.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

---

INPACT INTERNATIONAL

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

# Byggifrøðingur

Fyri ein kunda okkara, søkja vit eftir einum byggifrøðingi at byrja 1. mars 2001 ella skjótast gjørligt eftir hetta.

Talan er um eitt áhugavert fulltíðarstarv og fevnir um arbeiðsleiðslu bæði í Føroyum og uttanlands m.a.:

- leiða arbeiði á byggiplássum
- samskifti ímillum byggiánara og byggitakara
- ymiskar projekteringsuppgávur
- menna virki innan- og uttanlands
- annars alt vanligt arbeiði í hesum sambandi

Tað er avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til leiðslu og byggivirksemi, skrivi-, rokni-, tekni- og telduarbeiði. Tað hevur fyrimun, um umsøkjarin er útbúgvin innan timburfakið.

Fyri ein, ið kundi hugsað sær eitt sjálvstøðugt og fjøltáttað arbeiði við góðum arbeiðsviðurskiftum og góðum persónligum menningarmøguleikum, er hetta tað rætta starvið, ið setur stór krøv til tann menniskjansliga og fakliga førleikan.

Løn eftir avtalu.

Hevur tú áræði, kann virka sjálvstøðugt, góð samstarvsevni og hevur hollar royndir innan byggiyrkið, við ástøðiligari útbúgving, eitt nú byggifrøðingur innan timburfakið, so ert tú tann, vit søkja.

Nærri fæst at vita við at ringja tlf. 31 47 00 og spyrja eftir Alva Nielsen ella Jógvani Amonsson.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum verður at senda ***innan 20. februar 2001*** til:

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
**statsaut. revisorar**
R. C. Effersøesgøta 26 · Postrúm 191 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 314700 · Telefax +298 313815
E-mail: Inpact@post.olivant.fo
www.inpact.fo

---

Oljumálastýrið

# Journalførari til Oljumálastýrið

Í sambandi við barnsburðarfarloyvi verður hervið søkt eftir avloysara fyri journalførara í Oljumálastýrium. Starvið verður at seta 15. mars 2001 og er tíðaravmarkað til 1. apríl 2002.

Arbeiðið fevnir um journalisering í Doculive journalskipanini umframt at taka lut í dagliga arbeiðinum í Oljumálastýrinum eitt nú at avloysa í bókhaldinum og í móttøkuni.

Fyrimun hava tey, ið hava royndir og áhuga fyri journalisering og bókhaldi, umframt at duga væl føroyskt og enskt í skrift og talu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum lønardeildina hjá Fíggjarmálastýrinum og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Tinu Johannesen, Oljumálstýrið, telefon 357070, telefax 357075 og teldupost tinaj@oms.fo

Umsóknir, saman við avriti av prógvi og frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Oljumálastýrinum, Postboks 3059, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. februar 2001.

---

JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 · FO-188 Hoyvík · Tórshavn

---

**ADC-Heilsølan**
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

**ARBEIÐSHANDSKAR**
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

---

VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiðki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 31820

---

Elin Danielsen
Útb. fysioterapeutur

Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77

$O_2$

ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG
HITA · MASSAGU · LINNA

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

stephanssons hús

---

Sosialurin

Sosialurin -har tað hendir



Søkt verður eftir
# Skipara/stýrimanni

**Starvið:**
Er innan offshore vinnu, herundir oljuvinnu, kápulvinnu o.a.

**Krøv og ábyrgd:**
Viðkomandi kemur at hava ábyrgd av, at formligu reglur á økinum, verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum skipsføraril/skipari við STCW átekning
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkileiðara skeið
- GMDSS skeið
- ARPA skeið
- Kunnleika til ISM og ISO 9000 góðskustýring.

**Løn og setanartreytir:**
Verður sett eftir avtalu.

Umsóknin saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu verða okkum í hendi skjótast tilber.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnbjørn Joensen, stjóra, tlf. 422503 ella e-mail gunnbjor@thor.fo

**P/f Thor**
420 Hósvík
www.thor.fo

---

Føroya Fornminnissavn

# Avloysari fyri savnvørð í fornfrøði

Á Føroya Fornminnissavni er eitt starv sum avloysari fyri savnvørðin í fornfrøði leyst at seta sum skjótast og fram til 31. juli 2001.

Savnvørðurin skal umsita fornfrøðiliga arbeiði.

Umsøkjarin skal vera útbúgvin fornfrøðingur við kunnleika til føroysk viðurskifti og føroyskt mál.

Løn og setan eftir galdandi sáttmála millum Magistarafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kirstin Eliasen, vikarierandi landsantikvar á tlf. 310700.

Umsóknir við CV og avriti av próvtøkuskjølum skulu vera savninum í hendi í seinasta lagi 26. februar 2001 og verða sendar til:

**Føroya Fornminnissavn**
Hoyvík
Postboks 1155
110 Tórshavn

---

**P/F *ALMA***
***Maskinverkstaður & Smiðja***

# Leiðarastarv

Til at byggja upp service-verkstað okkara, verður søkt eftir manni við relevantari útbúgving, og sum hevur dirvi til at taka ímóti eini størari avbjóðing.

**Starvslýsing:**
Uppgávan verður at
- byggja upp eitt vælvirkandi service-verkstað
- savna, samansjóða og leiða eitt vælvirkandi team
- gera service-avtalur við viðskiftafólk
- røkja verandi kundabólk til lítar
- samstarva við okkara framleiðarar
- samstarva við leiðsluna
- stýra fíggjarliga raksturin av verkstaðnum.

**Førleikar:**
Vit kundu hugsað okkum ein mann við útbúgving sum maskinverkfrøðingur, ella tilsvarandi ástøði. Helst við praktiskum royndum, ella praktiskari grundútbúgving. Umframt á norðurlendsku málunum má viðkomandi eisini kunna samskifta í skrift og talu á enskum. Samstarvsevnir til allar síður verður raðfest frammarlaga, umframt at kunna taka sjálvstøðugar avgerðir.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Starvið er *ikki* eitt 8 til 16 starv.
Lønar- og setanarviðurskifti eftir avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, ert tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn við c.v. til okkara áðrenn 1. mars 2001, við áskriftini:
*att.: Eyðun Waagstein - Leiðarastarv*
Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vit umboða, selja og servicera maskinur, útgerð til maskinur, motorar og generatorsett. Eitt nú Caterpillar, MaK, Atlas Copco, Epoke, Erlau, RUD, Bucher - Schörling, Grove o.a.

**P/F *ALMA***
***Maskinverkstaður & Smiðja***
á Sandvíkahjalla 15
Postboks 1338
FO-110 Tórshavn
Tlf. 315890

---

# Frá Føroya Ríðingarfelag

Ársaðalfundur felagsins verður í felagshúsinum mánakvøldið 19. februar kl. 19.30. Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

---

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Citroën ZX Reflex 1.9 D st. car
**Árg.:** 1995
**KM.:** 75.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á Smyrilsvegi 20, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 345729 – 210729
fax nr. 345607
Heri Weihe
at hitta millum kl. 10.00–12.00.

---

# Takk

Tað var við stórum spenningi og vónum, at farið var undir tiltakið at seta etingarólag undir sjóneyku. Í byrjanini var tað rættiliga møtimikið, men tann hjálp, uppbakking og góðu ráð, sum vit fingu frá einstaklingum, og tí peningaliga stuðuli, sum peningastovnar og aðrar fyritøkur veittu okkum, gjørdi tiltakið møguligt.

Vón okkara er, at hetta verður til gagns og bata hjá teimum, sum treingja til hjálp á hesum øki.

Vit takka hjartaliga øllum, sum stuðlaðu á ymsan hátt.

Fíggjarliga støðið undir tiltakið løgdu:
**AVIS**
**HOTEL HAFNIA**
**HOTEL FØROYAR**
**ATLANTIC AIRWAYS**
**TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR**
**FØROYA LÍVSTRYGGING**
**FØROYA SPARIKASSI**
**FØROYA BANKI**

**Fyrireikararnir**

---

# Sminkuskeið

Spennandi og fjølbroytt sminkuskeið verður í Fuglafjarðar skúla leygardagin 17. februar.

Skrá:
1. Teknikur
2. Sjónleikarasminka
3. Klovna- og barnasminka

Skeiðsleiðari: Elin Madsen
Tilmelding og nærri kanning á tlf. 445115.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
Tlf. 444087

---

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Nissan Terrano II 4x4 2,7 Turbo Diesel Intercooler
**Árg.:** juni/1999
**Km:** 79.000
**Eyka útstýr:** El-rútar, centrallás.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 345600 lokal 727
Fartelefon nr. 214166
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 13-15